## DAGSINS MEINING

# Vandi á ferð

Nú er greitt, at tað verður George Bush, ið fer at stýra USA komandi fýra árini eisini. Um okkum dáma tað ella ikki, so mugu øll demokratiskt sinnað virða og góðtaka hesa sannroynd. Men vit hava samtíðis skyldu til at vera á varðhaldi, seta spurningar og ávara, tá hetta er neyðugt. Og tað verður ongantíð meira neyðugt enn júst nú. Sæð í bakspeglinum og við kjarnuveljarum forsetans, tí religiøsa høgra, í huga, er orsøk til at vera óttast og tí vera á varðhaldi, tí júst hetta val kann fáa sera óhepnar fyri USA og heimin annars. Um ikki Bush tekur í egnan barm eisini, (hvat vit tíverri hava ringar royndir av) rekur ein hóvligari politikk, ja flytur seg frá høgru og inn móti miðjuni, úti sum heima, kunnu vit skjótt gerast vitni til, at heimurin fer at verða ótryggari og vandamiklari. Sjálvandi hevur heimurin brúk fyri støðuføstum politikarum, men einsíðugt og einoygt støðufesti valdast, tá hugsað verður um, hvussu heimurin nú einaferð er settur saman. Tað er okkara sannføring, at heimurin hevði verið tryggari, um demokratiski flokkurin vann valið. Tað gjørdi hann ikki, og tí mugu vit hugsa og virka út frá tí sannroynd.

Um vit vilja tað ella ikki, so ávirkar gongdin í USA allan umheimin. Búskapurin í USA undir Bush er farin heilt út av lagi við himmalhøgum undirskoti, orsakað av skattalættum til tey ríku og galloperandi vøkstrinum í herðnaðarligu útreiðslunum. Hetta undirskot verður nú bara skumpað víðari til komandi ættarlið og fer tað aftur at avmarka møguleikarnar at gera íløgur í eina betri heilsu- og sjúkratrygging, sum er alneyðug í USA. Fyri ikki at tosa um útbúgvingartilboð til tey fátæku.

Hóast vit bara kunnu vóna, at Bush og hansara fólk fara at vera meira hóvlig, so sær svart út. Vandi er fyri, at eitt Bushstýrt USA fer at gera skilnaðin og kluftina millum kristna og muslimska heimin enn djúpri. Vandi er fyri, at eitt Bushstýrt USA fer at halda fram við sínum einvegis heimspolitikki, har hvørki ST ella hóvlig og sosialt/ humanistisk hugsandi lond í Vesturheiminum fara at vera eftirspurd. Vandi er fyri, at høgrakreftirnar fáa alt ov stórt vald. Her er útnevningin av nýggjum hægstarættardómarum mest ræðandi. Hóast Bush vann tepurt í 2000 og hann tí lovaði at virða og taka hædd fyri hinari helvtini av amerikanska fólkinum, so hevur hann ikki hildið hetta lyftið. Hevur tvørturímóti gjørt alt fyri at framala tað ekstrema høgra, sum fatar um hernaðarligar og kristnar fundamentalistar. Við tí úrsliti, at tað hevur skapt eitt øgiligt hatur millum liberal og so tey høgravíðgongdu. Vandi er fyri, at hann fer at halda fram á hesi leið við eitt nú at útnevna konservativar dómarar til Hægstarætt. Og tað fer at gera kluftina millum hóvligar og víðgongdar amerikanarar enn størri ikki bert komandi fýra árini men langt inn í framtíðina.

Tað verður ein vanlukka fyri Verðina fáa kristnu fundamentalistarnir og hernaðarligu heykarnir rundan um Bush ov nógv vald. Teir kunnu koma at seta eld í heimin. Vil Bush USA og heiminum væl eigur hann at seta hóvligar amerikanarar í týðandi lyklastørv, fólk, sum heldur enn at brenna brýr, byggja brýr.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Systkinaavsláttur á dagstovnum

**Jan Poulsen**
*Valevnið Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*



VAL04

Vit í Javnaðarflokkinum siga í okkara valskráð, at vit vilja arbeiða fyri, at foreldur at fleiri børnum sum ganga á dagstovni í Tórshavnar kommunu, skulu fáa systkinaavsláttur, soleiðis at tey hava ráð at hava børnini á dagstovnum.

Hetta gera vit, tí vit vita at tað er sera tungt fíggjarliga at fáa endarnar at røkka saman frammanundan, tí alt annað er so kostnaðarmikið her í kommununi, eittnú húsaprísirnir.

Um ein ung familja skal seta búgv her í kommununi, so er tað av alstórum týdningi, at tað ikki verður ein ov tung byrða um tey skulu hava børn eisini.

Tað kann ikki vera rætt, at tey skulu halda seg aftur við at fáa fleiri børn, tí tey ikki hava ráð til tað.

Vit sum polittikarar skulu vera við til at virka fyri, at skapa karmar og økja um trivnaðin, soleiðis at fólk støðast í kommununi, og vilja seta búgv her. Tað gera vit eisini við at fáa sett í verk, at foreldur at fleiri børnum á dagstovni, skulu fáa systkinaavsláttur.

Javnaðarflokkurin og harvið eisini eg, vil arbeiða hart fyri at fáa sett í verk systkinaavsláttur á dagstovnum, í kommununi.

# Postverkið privatiserast

**Gerhard Lognberg**
*løgtingsmaður og borgarstjóri í Skopun*



VAL04

Og hvat so, tá samgongan hevði hetta fyri at privatiserað Postverkið, og peningur var avsettur á fíggjarætlanini fyri 2005. Hetta var nógv viðgjørt, bæði í flokkinum og samgonguni.

Sjálvandi hevur hetta mín stóra áhuga, tí handaði eg løgmanni og tingmanning Javnaðarflokksins eitt skriv hesum viðvíkjandi, har ið eg gjørdi mína støðu púra greiða.

Eftir at samgongan var samd um at privatiserað, kemur postverksstjórin í bløðini, og greiður frá, hvussu alt skal gerast. Tað ljóðaði, sum at posthús skuldi verða í hvørjum pilsuvogni.

Nei, nei og aftur nei. Tað er samgongan sum skal verða samd um lógina um postverkið. Og her havi eg púra greiða støðu.

Samgongan skal fyrst verða samd um karmar, síðani skal hetta fyri tingið. Tá ið hetta er gjørt, kann postverkstjórin siga hvussu posthúsini verða framyvir.

Í Skopun er nærum einki eftir. Sparikassin flutti úr Skopun. Føroya Banki hevur næstan einki virksemi í Skopun.

So er tað posthúsið sum er eftir. Tað skal ikki verða við Gerhard sum samgongulimi, at posthúsið skal úr bygdini!

Teistin siglur á Skopun. Har við er tað heilt náttúrligt, at posturin verður sorteraður í Skopun.

Hetta er púra greitt mín støða, og hon broytist ikki.

Eg eri ikki valdur til at avtofta, men at byggja upp!

# Kommunan fyri øll

**Jói Winther**
*Valevni hjá Javnaðarflokkinum í Tórshavnar kommunu*

Tað er nógv sum liggur á láni:

Tað má gerast ein nýggj kanning, um nýggi ringvegurin eigur at verða gjørdur. Øll skulu verða hoyrd so at vit ikki leggja ein veg sum er til ampa fyri borgararnar. Ein veg sum kanska ikki álíkavæl nøktar tørvin í framtíðini, og gera ein veg sum tekur nakað av tí nærmasta heiðafuglalívi vit hava í býnum.Vit mugu fjálga um teir fáu grønu plettarnar vit eiga, og ikki leggja tær fáu traðirnar sum eru eftir undir asfalt, bert fyri løtuvinning.

Hølistrupulleikarnir í Argjaskúla skulu loysast, og ikki sum nú bert við eini fyribilsloysn. Parkerings trupuleikarnir í miðbýnum mugu loysast, so at gangandi og súklandi kunnu kenna seg trygg við, at bilar



VAL04

ikki standa til ampa allastaðni. Grøn økir sum ikki má koyrast á mugu gerast, har skulu barnagars børnini og onnur kunna vera, uttan at himprast fyri trygdini. Flestu vita at fríska luftin og natúran eru heilsubót. Hví veit sitandi samgonga ikki tað?. Um tú vil tað besta fyri øll í kommununi, so skift tey út. 9'nda hevur tú møguleikan, eg vil, vil tú?

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Teresa Jensen teresa@sosialurin.fo
Hjørdis Gregersen hjordis@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.



## VIÐMERKINGAR

# Ein Lágargarð aftrat

**Anna Maria Persson**
*Valevni Javnaðarfloksins til Tórshavnar Býráð*

Tað tykist, sum at øll sum stilla upp til kommunuvalið í Tórshavn, prioritera eldraøkið høgt. Guð gævið sagt, at so varð, tí ongastaðni er tørvurin á ellis- og røktarheimum so stórur sum í Suðurstreymi. Tórshavnar kommuna er væl fyri fíggjarliga og hevur tí ráð til at raðfesta vælferðaruppgávurnar.

Mett verður, at økið manglar 89 pláss í 2005. Tølini siga eitt. Runt í kommununi sita gomul og avlamin, sum ongum bíðilista eru á, men sum saktans kundu trongt til eina hjálpandi hond. Summi kundu við eitt sindur av hjálp havt ein tryggari gerandisdag heima, og onnur høvdu klárað seg í einum sambýli ella í eini eldraíbú.

Sjálvt um vit hava stovnar í Havn til tey gomlu, sum eru ringast fyri, so eru alt ov nógv, sum ongastaðni sleppa inn, tí pláss er ikk fyri teimum. Eg havi verið sjúkrasystir í kommunulæknaviðtalu í Havn í 23 ár. Ómetaliga ofta hava vit sitið og tosað við bæði gomul og teirra avvarðandi, um at nú má okkurt gerast, tí nú klára tey tað ikki longur. Hetta er ikki grenj, men gerandisdagurin hjá mongum, sum royna at taka sær av sínum gomlu, sum klára seg verri og verri,



VAL04

gerast sjúkari, gloymskari og meira óhjálpin, og mugu hava fólk hjá sær alt samdøgrið. Øll familjan er rakt, tí øll vilja vit gera tað allarbesta fyri okkara egnu. Ofta hevur tað verið svárt, at víst fólki frá sær, uttan at kunna hjálpa. Um eg í sovorðnum løtum varð spurd, um eg var stolt av at vera føroyingur, hevði eg sagt nei.

Sjálvt um landið enn hevur ábyrgdina av økinum, so verður tað kommunan, sum í nærmastu framtíð kemur at reka tað. So lat okkum longu nú ávirka, hvussu tað verður skipað og rikið á skilabestan hátt.

Røktar- og umlættingarheimið Lágargarður er ein vælvirkandi stovnur fyri tey, ið krevja kvalifiseraða hjálp alt samdøgrið. Á Lágargarði eru 48 bú-fólk. Vit hava brúk fyri einum Lágargarði aftrat.

Kommunan hevur peningin. Og vit kunnu tryggja, at hann ger gagn. - Ættarlið eftir ættarlið.

# Ein góð kommuna

**Meta C. Palle**

Tá ið tú ert á vitjan í onkrum av hinum norðurlendsku høvuðsstøðunum, finnur tú altíð handlar, sum selja heimavirkaðar lutir, ið eru serstakir fyri viðkomandi land.

Í Føroyum hava vit Heimavirkisfelagið, sum eg haldi átti at fingið møguleika at vera meira sjónligt.

Nú, tað frættist at H.N. Jacobsens Bókahandil skal broytast, hevði tað verið eitt frálíkt hugskot, at Heimavirkisfelagið kundi framsýnt og selt føroyskar heimavirkaðar lutir har.



VAL04

Samstundis kundi tað verið við til at varveitt og ment føroyskt heimavirki.

X við lista C.

# Psykiatriskt Røktarheim til tey sum hava sálarliga sjúku

**Halla Samuelsen**
*valevni hjá Javnaðarflokkinum*

Einki Psykiatriskt Røktarheim er til tey sum hava sálarliga sjúku, men stórur tørvur er á einum slíkum. Nógv eru tey, ið standa á bíðilista at sleppa inn á Ellis- og Røktarheim, og ringt er at sleppa inn. Tey sum hava eina sálarliga sjúku, hava oftani uppaftur verri við at sleppa inn. Tí hevði tað verið sera gott, um vit høvdu eitt Psykiatriskt Røktarheim til teirra. Fleiri fólk sum eru liðugt viðgjørd á Psykiatrisku deildunum, men sum ikki klára seg sjálvi, áttu heldur at sloppi inn á eitt Psykiatriskt Røktarheim.

Eingin ivi er um, at stórur tørvur er á einum Psykiatriskum Røktarheimi til tey, sum hava sálarliga sjúku.

Javnaðarflokkurin er greiður yvir støðuna, og vit ynskja at gera nakað við hetta, nevnliga at útvega Psykiatriskt Røktarheim til tey, sum hava sálarliga sjúku.

Fái eg tín stuðul til Býráðsvalið 9. nov., ert tú við til at gera umstøðurnar hjá teimum sum hava sálarliga sjúku, betri. So skal eg gera mítt til, at hetta mál verður loyst skjótt og væl.



VAL04

# Búsetingar-møguleikar

**Jógvan Finnur Poulsen**

Búsetingarmynstrið her hjá okkum hevur higartil verið so, at hvør skal eiga síni sethús. Hetta hevur umframt nógvan pening eisini kravt stór byggilendi til hvønn búreising. Í mongum førum má sigast, at úrnýtslan hevur verið alt ov lítil. Lendi har byggjast kann er avmarkað, tað sær ein og hvør, sum eygu hevur. Her má ikki oyðslast men gagnnýtast sum best.

Fleiri kommunur, eisini nakrar minni enn okkara, hava boðið borgarum sínum alternativan møguleika - nevniliga raðhúsabygging ella íbúð.

Væl veit eg um kanning, sum gjørd varð her fyri árum síðan v. v. hesum, og at áhugin var lítil. Tilboð býráðsins var búseting úti á Dal, men eg hugsi, at betur hevði verið um møguleikin eisini var inni í Fuglafirði.

Tað eru ikki øll, sum



VAL04

leggja í at eiga stórt grundstykki at halda og høvdu gleðiliga tikið av slíkum tilboði.

Hetta er eitt av málunum, sum troka á at vera loyst.

Hesum fara vit at arbeiða fyri.

Eingin ivi valdagin - sjálvandi C

Tað sigur C sjálvt.

# Tey bleytu virðini

**Jóhan Heri Joensen**
*Fuglafjørður*

Nú stundar aftur móti vali, nógv eru valevnini, sum bjóða seg fram meira og minni í jólahýri við gávu í hond.

Hvussu úrslitið verður er sum altíð ilt at gita, men vónandi verða tað fólk sum ikki stara seg blind í dagligum bagatellum, men seta kós fram í tíðina, taka arbeiði í álvara og ikki minst vilja brúka tíð uppá hetta týdningarmikla arbeiði. Fólk, sum hava visiónir og viljan at skapa nakað býnum og fólkinum til frama.

Sjálvur havi eg sitið í býráðnum í 8 ár, og øll árini sum formaður í mentanarnevndini sum hevur havt ábyrgdina av: *skúla, barnaansing, eldrarøkt, miðstaðarøkið, og mentan annars.* Ikki er ringt at leggja til merkis tey stóru mál, sum mentanarnevndin hevur sett í verk hesi árini.

- Á eldraøkinum slóðaðu vit fyri í landinum táið Vesturstova opnaði.
- Hava avsett pening og skulu byggja nýtt ellisheim.
- Barnarøktin er útbygd við dagrøkt og frítíðarskúla. Børnini verða nú ansað til og við 2. flokk.
- Nýggjur skúli tikin í nýtslu, og skúlin sum heild uppdateraður.
- Stuðlað Mentanarhúsið soleiðis, at tað kundi verða tikið í nýtslu .
- Lagt graslíki á vøllin
- Deilt út plantupakkar og sett í verk urtagarðskappingina.
- Miðbýurin er í fer við at blíva fríðkaður.
- Høvdahúsini sett upp sum fornminni..
- Piddasa handil verður keyptur í hesum árinum.
- Standmyndir í bátahylinum.
- Enn ein standmynd/ minnisvarði bestilt og verður uppsett í nærmastu framtíð.
- Mentanin annars fingið stuðul sum onga aðrastaðni í landinum.
- Fuglafjørður trínur fram sum mentanarbýurin, sum onnur brúka sum fyrimynd.

Tey bleytu virðini koma upp at venda hvørja ferð val er, og nógv eru tey, sum koma við ætlanum og vøkrum dreymum. Tíðin hevur víst, at flestu dreymarnir blíva við at verða dreymar, sum flákra í vindinum, har teir verða hangandi til teir 4 ár seinni aftur verða nýttir sum uppafturtiðnað agn.

Táið eg fyri 8 árum síðani kom inn í býráðsarbeiði valdi eg, í , staðin fyri bert at tosa um dreymar, heldur at føra teir út í lívið.

**Javnaðarflokkurin vil halda áfram at loysa mál við at hyggja fram í tíðina.**

Tað sigur **C** sjálvt.
hvønn tú skalt velja.